# Æðuvík er o

## Ein gullklumpur



**BESTI BARNAGARÐURIN**

*– Náttúrubarnagarðurin Víkin er ein gullklumpur, sum vit eru sera góð við. Eg skilji tí ikki rættiliga, at børnini skulu flytast til nýggja dagstovnin í Søldarfirði, sigur Súsanna Brekku. – Har fáa tey í øllum førum ikki somu møguleikar sum her í Æðuvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Eg má heilt erliga siga, at bæði eg og mong onnur við mær eru sera kedd um, at vit missa barnagarðin í summar**

Tað eru helst ikki nógvar smærri bygdir í Føroyum, sum hava ein so vælumtóktan barnagarð sum tann í Æðuvík – náttúrubarnagarðin »Víkin«, sum greitt verður frá aðrastaðni í blaðnum.

Barnagarðurin byrjaði fyri átta árum síðani. Men ein politisk avgerð í býráðnum er tikin um, at hann skal lata aftur og børnini flytast í nýggja dagstovnin, sum verður tikin í nýtslu í Søldarfirði seinni í summar.

Tveir av dreingjunum hjá Súsannu hava gingið her, og bæði teimum og foreldrunum hava dámað hetta sera væl. Tann fyrri drongurin var ein innidrongur, og foreldrini stúrdu eitt sindur fyri, hvussu hann fór at trívast millum øll hini børnini.

– Vit fingu annað at síggja. Og tá satt skal verða sagt, so er hansara stóri kunnleiki til náttúru og djóralív fingin gjøgnum tiltøkini í barnagarðinum.

– Ja, eg má heilt erliga siga, at bæði eg og mong onnur við mær eru sera kedd um, at vit missa barnagarðin í summar, sigur Súsanna, sum kortini livir í vónini um, at hann kann halda fram.

– Náttúrubarnagarðurin Víkin er stutt sagt ein gullklumpur.

snorri@sosialurin.fo



**ÆÐUVÍK** – Hvørki maðurin ella eg hava nakað við Æðuvík at gera. Men nú vit hava búð her í fimm ár, kann eg bara staðfesta at hetta er heimsins besta stað. Her stórtrívast vit, sigur 28 ára gamla Súsanna Brekku úr Klaksvík. Hon kundi ikki hugsað sær at búð nakra aðrastaðni enn í Æðuvík

Snorri Brend

Ein mikudag í farna mánaði fór Súsanna Brekku sum so mangan áður í náttúrubarnagarðin í Æðuvík við barni sínum.

Veðrið var til at trilla lítlu dóttrina, meðan tann nakað eldri sonurin súkklaði á 3-hjólaðu súkklu síni tann stutta teinin millum heim og barnagarð.

Ein púra vanlig sjón í lítlu bygdini á eystursíðuni á Eysturoynni. Og ein gerandislig hending, sum Súsanna ikki hugsar stórvegis um.

Tað kann tó tykjast løgið hjá onkrum, hví í víðu verð ein ung kona úr einum stórbýi endar í so fjarskotnari bygd sum hesari? Og serliga tá ein hugsar um, at maðurin heldur ikki er hiðani.

– Eg hevði verið vikarur á Kalsoynni, og har dámdi mær sera væl. Hetta var eitt lítið stað, gott samanhald, og hóast eingin stórur handil var beint har, hugsaði eg einki serligt um tað, greiðir Súsanna frá.

– Og so var tað heldur ikki alt ov langur vegur til Klaksvíkar, um ein skuldi har.

Hvussu var og ikki: Súsanna búði eftir hetta eitt skifti á Glyvrum, men á einhvønn hátt longdist henni eftir friðinum og ikki minst eftir tí lítla samfelagnum.

Alt hetta funnu hon, maðurin og børnini her í Æðuvík.

### Heimsins nalvi

Tá tann elsti sonurin var vorðin fimm ára gamal, slapp hann inn í náttúrubarnagarðin í Æðuvík.

Saman við góðu starvsfólkunum og hinum børnum kom hann at trívast sera væl her. Og tað kom mamma hansara eisini at gera:

– Tað var simpelthen bara so well her í Æðuvík, – alvorliga well, sigur hon við góðari Klaksvíks-dialekt.

Tann eina avgerðin førdi til ta næstu. Og tá tey frættu, at eini hús í bygdini vóru til sølu, avgjørdu tey at kanna hetta málið nærri. Sjálv hevði Súsanna ikki hugsað tankan

**Tað er líka við, at man trívist her pr. automatikk**

um at búseta seg her, men ein koyritúrur eftir smala Æðuvíkarvegnum ein sunnudag kann broyta so nógv.

– Ja, er tað ikki ótrúligt? Vit